# Korndalsgarður á Eiði søkir eftir námsfrøðiligum stuðli



Søkt verður eftir einum námsfrøðiligum stuðli til eitt barn við avbjóðingum. Starvið fevnir um arbeiði tveir seinnapartar um vikuna fram til summarferiuna. Møguleiki er eisini fyri setan á upp til 20 tímar um vikuna.

Arbeitt verður á stuðulsstovu, har dentur verður lagdur á at tryggja fyrisigiligheit og støðufesti fyri barnið. Góðir møguleikar eru at nýta náttúruna sum part av arbeiðinum.

Tíð er sett av til fyrireiking og eftirmeting, sum fer fram í samstarvi við aðrar námsfrøðiligar stuðlar, umframt sparring við sálarfrøðing frá Sernám.

Meira fæst at vita um starvið við at venda tær til leiðaran á tlf. 740410.

Starvið er sett at byrja 1. februar ella skjótast gjørligt. Um eingin námsfrøðingur søkir starvið, kann hjálparfólk verða sett.

Løn sambært sáttmála millum Kommunala arbeiðsgevarafelagið og Føroya pedagogfelag.

Vit gleða okkum at fáa eina umsókn frá tær áðrenn 25. januar 2026 kl. 14.00. Umsókn, prógv v.m. verða at senda til korndalsgardur@eidi.fo

Faldari um stovnin er at finna her: https://www.eidi.fo/wp-content/uploads/2023/07/Korndalsgardur-FALDARAI-2023.pdf

Sambært §2 í barnaváttanarlógini hava vit skyldu til at fáa barnaváttan til vega, áðrenn umsøkjari verður settur í starv.